Álit

í

løgtingsmáli nr. 29/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (Stuðul til avlamisakfør)

Helgi Abrahamsen, Eyðdis Hartmann Niclasen, Johan Dahl, Magnus Rasmussen og Bárður á Steig Nielsen, tinglimir, hava lagt málið fram 31. oktober 2025, og eftir 1. viðgerð tann 4. november 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 13. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við MEGD, Áhugafelagið Koyristólur Skerdur Førleiki (KF), Katrina Dagbjartsdóttir og Hjalta Skaalum og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Jóhan Dahl, Jaspur Langgaard og Árni Skaale) hevur hesar viðmerkingar:

Í 2023 valdi ein meiriluti av Løgtinginum at broyta lógina um avlamisbilar munandi. Hetta var eitt spariuppskot hjá landsstýrinum, sum skuldi spara landinum 1 mió kr.

Broytingin hevur havt við sær sera óhepnar avleiðingar fyri nógv fólk við avlamni. Fyri nógv fólk við avlamni er bilur avgerandi fyri teirra flytføri. Fyri tey er bilur at rokna sum eitthvørt neyðugt hjálpitól.

Við lógarbroytingini í 2023 varð allur stuðul til vanligar bilar til avlamin strikaður. Hetta helt meirilutin tá verða skeivt, og tað heldur meirilutin framvegis.

Undir nevndarviðgerðini er komið fram, at gamla lógarásetingin í summum førum gav størri stuðul enn neyðugt. Men heldur enn at gera tillagingar í lógini, so valdi landsstýrið heilt at avtaka ásetingina. Hetta hevur havt við sær sera óhepnar avleiðingar fyri mong, sum veruliga hava brúk fyri hesum stuðli.

Fyriliggjandi uppskot merkir, at vit fara aftur til gomlu ásetingarnar. Ásannandi, at tillagingar burdu verið gjørdar, ynskir meirlutin, at landsstýrið við sínum kunngerðarheimildum ger broytingar og um neyðugt at gera uppskot til lógarbroyting og leggja fyri Løgtingið.

Við at seta gomlu ásetingarnar aftur í lógina væntar meirilutin, at landsstýrið fer at arbeiða skjótt við slíkum broytingum. Óhepnu avleiðingarnar fyri avlamin kunnu ikki bíða.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Liljan Weihe og Hans Jacob Thomsen) hevur hesar viðmerkingar:

Samgongan broytti á heysti í 2023 lógina um almannatrygd og tænastur. Broytingin var í høvuðsheitum tann, at stuðul ikki verður latin til sjálvan bilin, men til serligan útbúnað og tær útreiðslur, sum eru knýttar at tí. Lógin kom í gildi 1. januar 2024 og hevur sostatt virkað í skjótt tvey ár.

Lógin bleiv broytt fyri at tálma útreiðsluvøksturin hjá landskassanum.

Minnilutin heldur tað vera gott at eftirhyggja og eftirmeta almennar skipanir. Verandi lóg hevur nú virkað í næstan 2 ár.

Undir viðgerðini í Trivnaðarnevndini er komið fram, at lógarbroytingin, sum varð framd fyri tveimum árum síðani, hevur havt nakrar óhepnar avleiðingar fyri tey, sum hava tørv á einum avlamisbili.

Tó er eisini komið fram, at ynskiligt er ikki at venda aftur til gomlu skipanina, sum er umsitingarliga tung, men heldur at arbeiða við at fáa eina nýggja skipan, sum er til gagns fyri tey, sum hava tørv á stuðli til avlamisbilar og samstundis er munandi lættari at umsita enn verandi skipan.

Tí heitir minnilutin á landsstýrið at kanna, hvussu stuðul til avlamisbilar kann skipast frameftir, so skipanin virkar fyri brúkaran, er gjøgnumskygd og løtt at umsita.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 2. desember 2025

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Jaspur Langgaard
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	